## Aftur og fram í løgtinginum

Tá løgtingið kom saman til tingfund í týsmorgunin, vóru umskipingar framdar í skipanini, sum flokkarnir sita eftir í tingsalinum.

Skipanin virkar soleiðis, at flokkarnir sita í salinum eftir støðd við størsta flokkinum fremst. Men eftir at Karsten Hansen er farin úr Tjóðveldisflokkinum í Miðflokkin, er fyrrnevndi flokkur bert triðstørstur og tískil fluttur av fremstu røð aftur á ”triðja pláss” í tingsalinum.

So flokkurin, sum fyri stuttari tíð síðani í eitt styttri tíðarskeið hevði mist ein tinglim, Sambandsflokkurin og Johan Dahl, er nú fluttur fram í fremstu røð í tingsalinum.

Soleiðis gongur tað upp og niður og aftur og fram í politikki. **- leo**

## Oyramerkja blokkin

Danski fólkatingslimurin Poul Ørum Jørgensen, sum er framsøgumaður hjá Konservativa Fólkaflokkinum í grønlendskum viðurskiftum, heldur, at Fólkatingið eigur at gera av, at ein ávísur partur av blokkinum til Grønlands skal brúkast til at nýskipa tað sosiala arbeiðið. Poul Ørum Jørgensen sigur seg vera skelkaðan av einari frágreiðing, sum lýsir sjálvmorð og sjálvmorðsroyndir í Grønlandi, og nú má okkurt gerast, sigur hann.

Bláabók Sjúkrarøktafrøðinga Føroya:

# Partur av kvinnusøguni í Føroyum

**Seks ár hevur tað tikið at savna upplýsingarnar um sjúkrarøktarfrøðingarnar í Føroyum. Nú úrslitið fyriliggur er hetta ein týðandi partur, ikki bert av sjúkrarøktarfrøðingasøguni, men eisini av kvinnusøgu Føroya.**

BÓKAÚTGÁVA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Jana H. Dalsgaard og Hansa Christiansen (myndin) hava saman vi› Anniku og Hervør Ejdesgaard savna› og lagt til rættis alt tilfari› í 330 sí›ur drúgvu bókini. Seinkingin av útkomudegnum gjørdi, at eisini mynd av fyrstu bachelorunum í sjúkrarøktarfrø›i kom vi› í bókina.*

Tær hava altíð havt áræði, sjúkrarøktarfrøðingarnir.

Ella rættari tey –tí sjúkrarøktarfrøðingastarvið er ikki fyri kvinnur einans. Mannfólk finnast eisini innan økið.

Tær hava verið har til allar tíðir, sjúkrarøktarfrøðingarnir. Ikki altíð við einari útbúgving at vísa á, men kortini ikki minni neyðugir fyri tað. Og í Føroyum er útbúgvingin rættiliga nýggj.

”Sjúkrasystraskúlin varð ikki settur á stovn í Føroyum fyrr enn í 1960, so undan tí máttu sjúkrasystrarnar, - meinigheitspleygirskir ella sjúkrapleygirskir, sum tær tá vórðu nevndar – taka útbúgvingina í Danmark”, sigur Jana H. Dalsgaard, skjótt fráfarandi formaðurí Sjúkraróktingarfelagnum.

Tankin um at savna sjúkrarøktarfrøðingarnar í einari bók er ikki nýggjur. Og fyri seks árum síðani – í 2001 – legði Jana so uppskot fyri nevndina um at fáa tikið stig til eina slíka bók.

Slíkt arbeiði tekur tó drúgva tíð, men í 2004 vórðu so fyrstu spurnarbløðini send út, fyrst og fremst til limirnar í felagnum.

### Ófullfíggjað hagtøl

Ein av heilt stóru trupulleikunum í sambandi við bókina var, at finna fram til serliga eldru sjúkrarøktarfrøðingarnar, tí hagtøl og yvirlit eru so ófullfíggjað, og í summum førum enntá als ikki til.

Føroyski sjúkrasystraskúlin hevði einki yvirlit yvir flokkarnar gjøgnum árini, og tí gjørdist arbeiðið at savna tilfar sera trupult og tíðarkrevjandi.

Tað sigur seg sjálvt, at tá so lítið av tilfari er at halla seg til, verður ógvuliga trupult at fáa eitt fullfíggjað yvirlit yvir allar útbúnar sjúkrasystrar og sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum. Og at bókin ikki er fullfíggjað, fjalir Jana H. Dagsgaard ikki útyvir.

”Hendan bókin skal ikki metast sum nakað endaligt, men heldur byrjanin til eina framhaldandi útgávu, sum alla tíðina verður dagførd. Vit vænta avgjørt, at tey, ið av einari ella aðrari orsøk ikki eru við í hesi fyrstu útgávuni, fara at gera vart við seg soleiðis, at tey verða við í komandi útgávum”, sigur Jana H. Dalsgaard.

Hetta, at geva út eina bláubók yvir yrkisbólkar, er ikki nakað ókent, og m.a. Føroya Lærarafelag hevur givið út eina slíka bók. Bókin hjá Sjúkrarøktarfrøðingafelagnum brýtur tó nakað frá í støðd, har hevur verið skeitt meiri til útgávuna, sum íslendska systirfelagið hevur latið gjørt. Í Íslandi er triðja útgávan hin nýggjasta.

### Skriva søgu

Jana H. Dalsgaard veit ikki nágreiniliga at siga, hvussu nógvar sjúkrarøktarfrøðingar bókin umfatar, men talið liggur um 1000. Menninir í bókini eru ein rár sjón, men teir eru har.

Til stuttleikar kann nevnast Axel A. Johannesen, sum í dag er 80 ára gamal. Hann var við á fyrsta liðinum av útbúnum sjúkrapleygarum, ið eisini umfataði mannfólk.

Sjúkrarøktarfrøðingarnir hava tikið væl ímóti áheitanini um at lata upplýsingar til bókina. Hon lýsir lívsleið hjá øllum frá vøggu til dagin í dag, og tað hevur enntá eydnast at fingið mong við, sum ikki eru millum okkara longur.

Av tí at upplýsingarnir eru so gjølligir, er bókin ikki bert ein ”hvør-er-hvør” innan sjúkrarøktarfrøðingaøkið, men so sanniliga eisini einn týðandi partur av kvinnusøgu Føroya seinastu útvið 100 árini. So tað var bert partvís av tilvild, at bókin kom út júst 8. Mars.

”Upprunaætlanin var, at bókin skuldi koma út til jólar í fjør, men skotbráið gjørdist ov stutt. Og tá bókin eisini er ein partur av kvinnusøguni, hildu vit tað vera passandi, at útgávudagurin gjørdist altjóða kvinnudagurin 8. mars”, sigur Jana Dalsgaard.

Fyrstu sjúkrapleygurnar ella meinigheitspleygurnar, sum tað tá nevndist, vórðu útbúnar í 1912, og tá var tað Færø Amts Hospital, ella Gamla hospital sum tað var rópt millum manna, ið stóð fyri útbúgvingini. Og sjúkrahúsini stóðu fyri útbúgvingini heilt fram til 1960, tá Sjúkrasystraskúli Føroya var settur á stovn.

Drúgva savningararbeiðinum hava Jana H. Dalsgaard, Hansa Christiansen, Annika Ejdesgaard og Hervør Ejdesgaard staðið fyri. Hetta verður samstundis seinasta avrik hjá Janu H. Dalsgaard sum formanni í felagnum, Hon leggur frá sær eftir aðalfundin, sum verður leygardagin.

Í sambandi við bókaútgávuna verður almenn móttøka í hølunum hjá Sjúkrarøktarfrøðingafelagnum í Lucas Debesargøtu 14 nú hósdagin kl. 16 til 18.